# Landbukkutátturin

Ein vísa lýðandi
alt upp á há.
Alt um eina bukku,
sum til vanlukku,
hon gekk herfrá.

2. Eg tók hana í hendurnar,
og hon var full,
so illa skvampaði
og hartil dampaði
tað tvag av ull.

3. Eg hevði mær
so ring ráð til tøð,
men tað var ongin vandi
at sanka saman landið
og leska mín bø.

4. Og tað mundi vera
um ein leygardag,
eg fór so stillandi,
ikki var burturspillandi
hvørki land ella tvag.

5. Sum eg tá oman
eftir teiginum gekk,
eg fór eftir nakkanum,
bukkan út av bakkanum,
ein klams hon fekk.

6. So stóð eg har
á bakkanum og græt.
Eg sá, hvussu stavirnir
teir fuku í glaðurnar
– teir  skiltust at.

7. Mín góða bukka,
nú skiltust vit at,
fullvæl eg tað visti,
at mín ónda systir
bar til tín hat.

8. Eg sansaði ikki straks
til at fara eftir bát,
eg stóð bara og kurraði,
mínar hendur snurraðu
– við sukk og grát.

9. So fór eg til Jákupsar,
sum var mítt mát.
Eg bað hann ydmygelig
og så omsigelig
at læna mær bát.

10. Jákup í meg hvesti
og skar saman tenn:
”Uden tu forsamler
både unge og gamle,
átta útvaldar menn.”

11. So fór eg um bygdina
rætt sum ein hund.
Eg har umvankaði
og samansankaði
átta menn í ein skund.

12. So fóru vit á Hamarin
alt í ein hast.
Við fullgóðum treysti
ryktu bátin úr neysti,
so at núgvan brast.

13. So lættliga báturin
eftir Hamrinum gekk,
eftir ongum lunni,
Pól við naknum drunni
á stavninum hekk.

14. Jákup setti seg í rongina
út vestur eftir grunn'
við eygum glíggjandi –
hann var so illa síggjandi –
er hatta landbukka tín?

15. So góvu teir bátinum
eitt fullkomið dik.
Antin er hatta æður
ella landbukkustavir
ella sjórikið spik.

16. Ein óhent landbukka
var tað fyri meg.
Eg var vátur sum hundur,
tá ið bukkan gekk sundur.
– Á sukk, Á ve!

Jógvan í Glasstovuni (1717–1792) á Eiði yrkti tátturin, sum stendur í TÆTTIR III hjá M. Johannessen. Sum í so mongum øðrum tátti er okkurt ørindi so grovt, at tað ikki er sloppið við. Landbukkuteigarnir eru á Eiði, og Marius Johannessen kundi vísa á teir.
jd.